

David Phelps hevur eina fantastiska rødd
Mynd: Álvur Haraldsen

løgini. Hann bergtók áhoyrarnar, tá ið hann fleiri ferðir helt einum sera høgum tóna longri, enn tað átti at verið gjørligt hjá einum menniskja. Førleikin til at syngja høgt er eisini vørumerkið hjá David Phelps.

Systurin hjá David syngur stuðulsrødd í bólkinum hjá honum. Hon hevur eisini eina vakra rødd, og tey komplimentera hvønn annan væl. Eisini var ein violin-spælari við í bólkinum. Hon hoyrdist tó alt ov illa í summum av teimum villaru løgunum. Eisini hoyrdist guitar-spælarin ov illa.

Eingin bass-spælari var við, men tó var ein bass-ur programeraður í ljóm-borðinum. Okkurt annað var eisini spælt "play-back", men hetta gjørdi ikki stjørnuna hjá David Phelps minni hjá áhoyrarunum.

Phelps hevði gott samband við áhoyrarnar, og hann endurtók fleiri ferðir, hvussu glaður hann var fyri at vera í Føroyum. Hetta fall sjálvandi í góða jørð hjá okkum ernu føroyingum.

Phelps megnaði veruliga at syngja seg enn longur inn í hjørtuni hjá pro-gospel-føroyingum. Hann vísti, at hann er líka góður "live" sum á fløgu og í sjónvarpinum.

Konsertin við David Phelps var verd at bíða eftir. Tað var ein son framvísing av einum framúrskarandi vokalisti.

# Martin og sangskatturin

**Martin Joensen og manning hansara hugnaðu sær í Flags-tjaldinum á Summar-festivalinum, og løg sum Morgun og Ró rørdu lurtararnar, sum sungu við, tá hesar vøkru balladurnar ljóðaðu**

Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Martin Joensen hevur við hepnari hon funnið sær veg fram úr leiklutinum sum sangskrivari og tónleikari, til leiklutin sum troubadourkendur tónleikari og sangari, ið framførur løg síni, ið teljast millum tey, sum føroyingar veruliga hava tikið til sín.
Tað fyltist skjótt í tjaldinum, tá Martin Joensen var farin á pallin.
Tað kendist, at fólkini, sum mundu teljast í øllum aldri, her vætnaðu sær nakað gott og at tey vistu nøkulunda hvat tað var, tey fingu at hoyra.
Og hóast nøkur nýggjari løg ikki rættiliga fingu fjøldina uppfrá, so var øðrvísi, tá løg sum Morgun og Ró komu. Tá raknaðu fólk við. Og eisini onnur løg av lívligari slag, og sum fólk kennast við, so sum Tað Gongur Nokk, høvdu somu ávirkan.
Og stuttligt er tað, at Martin sjálvur er farin at spæla gamla klassikara sín Svarti Ravnur. Lagið er so inngrógvið við útgávuni hjá Kræklingum, men hóast hetta, so riggar útgávan hjá Martin og vinmonnum væl. Talan er um eina útlegging av Svarta Ravni við heitari suðuramerikanskum rútmum og tað riggar.
Tjaldið er ófórt til slíkar konsertir, har talan er um tónleik, ið ikki er so harður. Hjá Martini eru tað vælsitandi løgini og ikki minst vælskrivaðu orðini, ið hava týdning.
Tað var í roynd og veru talan um eina sanna hugnaløtu saman við Martin Joensen og manningini; ólavur, Jákup, Pauli, Niels og Jónleif.
Heldur turt humor hóskaði væl. T.d. stuttu viðmerkingarnar og tá Martin og Ólavur og teir greiddu frá, at teir høvdu vant nøkur dansitrin og teir tóku nøkur av hesum. Men hetta mátti gerast í steðginum millum sangirnar, tí annars órógvaði tað spæli!!!
Jú, tónleikararnir spældu sær og alt kendist óformelt og niðri á jørðini. Og harvið náddi Martin útum pallkantin og fekk samband við fjøldina.
Ljóðið var kanska ikki í topp, men so við og við gjørdist betri.
Tá Martin hevði spælt í ein tíma og tað, ið líktist hálvum tíma, so takkaði hann av, men kravið frá lurtarunum var greitt: Her kravdust eykaløg! Og Morgun skuldi so avgjørt vera eitt teirra.
Tað endaði við, at umframt Morgun, so sang Martin 60'ini. Men so mátti hann eisini gevast, tí nú var annað á skránni á stóra pallinum á Vágsbø.
Men Martin kundi óivað oyst av sínum sangperlum eina góða løtu afturat. Hann eigur nøkur av bestu orðum og bestu løgum, ið ættarlið júst nú goyma í hjartanum. Ongin ivi um tað.

# felagssangin

ljósu løtur.

Men við ljósa og vælswingandi poppinum hjá stóru popp-stjørnuni frá fyrst í átta-tiárunum livnaði Vágsbøur, og eisini føroyska all-stars orkestrið, ið var partvís samansett av manning úr Showmonnum og nøkrum góðum og garvaðum nøvnunum afturat úr føroyskum tónleikalívi. James, Johannus, Kim, Ólavur og Jákup sluppu at royna seg og stóðu royndina.
Og hóast F.R. David sigur, at orðini ikki koma so lættliga, so er tað í hvussu er nakað við løgum hansara, ið setur seg fast beinanvegin.
Lagið Words riggaði sjálv-andi beinanvegin júst sum tað skuldi og talan var um felagssang á Vágsbø, so væl sum fjøldin tók undir, og so lættliga sum orðini fullu.
Men eisini onnur løg, sum ein als ikki helt seg kenna, sótu beinanvegin og summi hava ligið goymd í dulvitinum í áravís, klár at taka fram á Vágsbø í 2006. Har eru løg sum I need you, Year of the cat, In my mind og Sahara Nights, ið er eitt lag við heitum rútmum, ið vóru kærkomnar á Vágsbø.
Stutt sagt, so var talan um popptónleik úr fyrstu skuffu, tá F.R. David kom á pallin á Vágsbø og tað var onki at taka seg aftur í, at tonleikarar, eins væl og lurtarar, hugnaðu sær ófort afturvið lætt gloytu tónunum frá hesum franska stjørnuskotinum frá áttatiárunum.
Tað var sum Frændur einaferð søgdu; Eg í 80'unum livi! Vágsbøur fór eina stund aftur í tíðina við F.R. David, ið onki er broyttur. Hvrki hvat útsjónd ella ljóði viðvíkur. At høga røddin kanska ikki tóktist so støðug onkra sera stutta løtu, varð fyrigivið fransmanninum, sum kom úr hitanum í París og segði seg dáma at standa á heldur kalda pallinum´á Vágsbø

**Poppurin í hásæti.**
Tað var eitt sonevnt popp-ikon, sum stóð á palli. Ein maður, sum fekk stóran part av heiminum at syngja við uppá eitt lag, sum var so væl skrivað, at ein skuldi ikki hildið, at eitt so íoyrafallandi lag var eftir í hópinum av óskrivaðum løgum.
Kanska óvæntað hjá mongum, so var F.R David maðurin, sum borgaði fyri eini góð-ari, veitslukendari og sera lættari og vælswingandi poppløtu, ið var júst so, sum hon skuldi.
Við øðrum orðum sleppa orð sum; gamalt, slitið, avdankað, og onnur tílík, ikki framat her, tí soleiðis var framførslan als ikki.
Tá F.R. David spældi Words sum eykalag, so gjørdist talan um veitsluróm við felagssangi og hugnin náddi hæddirnar.

# Vágspopp

**Hvussu væl kennir tú David Phelps og hvat væntar tú tær av honum, nú hann skal á pallin um eina lítla løtu?**



### Tóra við Keldu

- Eg kenni hann bert frá Gaither upptøkunum. Eg havi ofta hugsað um, at júst hann hevur sungið sera væl, men eg kenni ikki so nógv til hansara soloverk. Men eg eri spent at hjoyra hann, tí hann hevur góða rødd, og so er tað eisini sjálvt upplivilsi, ið ein konsert altíð er. Tað er altíð gott at síggja og hoyra fólk framføra.



### Hanni Højgaard

- Eg kenni David Phelps frá Gaither, men eg kenni hann annars ikki so væl. Men eg vænti mær góðan tónleik. Men eg vænti ikki, at alt verður so kent fyri mær, tí eg kenni hann mest sum luttakara í Gaither sangløtunum.



### Johan Berg Johansen

- Eg rokni við góðum tónleiki. Eg kenni ikki so nógv til David Phelps, men eg havi hoyrt hann, tá hann hevur luttikið á Gaither sangløtum. Hetta er tað sum eg sum festivalgestur havi bíðað eftir.

*(Myndir/lagt tilrættis: D.Olsen)*